Búskapur og vinna:

## Týskarar fiska ólógliga

Tað er ikki bara undir Føroyum, at týsk skip hava ilt við at halda veiðireglurnar. Mánadagin kom danska sjóverjan fram á eitt týskt skip, sum fiskaði ólógliga har suðuri í danska partinum av Norðsjónum. Talan var um eitt skip, sum fiskaði rækjur og skeljar, og sambært donsku sjóverjuni er hetta ikki tað einasta týska skipið, sum hevur verið á leiðini í seinastuni.

Týska skipið, sum varð tikið mánadagin, missir reiðskapin og veiðina. Harafturat fær skiparin bót, og í málum sum hesum plagar bótin at vera 40.000 krónur.

## Fiat í kreppu

Stóra italska bilverksmiðjan Fiat er komin í fíggjarligar trupulleikar. Bilasølan hevur verið minkandi, og tí hevur leiðslan í felagnum gjørt av at siga fólki upp. Í løtuni arbeiða 198.000 fólk hjá Fiat, og av teimum arbeiða 100.000 á verksmiðjunum í Italia. Fyribils hevur leiðslan boðað frá, at 4000 fólk noyðast til hús, men hildið verður, at hetta fer ikki at muna nóg nógv.

Fiat eigur 90 prosent av Ferrari, og eygleiðarar halda, at felagið noyðist at selja ein part av partabrøvunum í Ferrari fyri at útvega nóg mikið av pengum til ta kreppuraktu fyritøkuna.

## Leggur frá sær

Stjórin í Det Norske Veritas, Helge Midttun, hevur valt at leggja frá sær. Avgerðina hevur hann tikið eftir tíðindi um, at hann seldi Det Norske Veritas partabrøv í einari fyritøku, og at prísurin var oman fyri tað, hann veruliga átti at verið. Avgerðin hevur eisini samband við tíðindi um tann sera góða sáttmálan, sum hann fekk við Det Norske Veritas, tá hann gjørdist stjóri. Við sáttmálanum tryggjaði hann sær m. a. 15 mió. krónur í pensjón.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Russland við í NATO-ráði



George W. Bush og Vladimir Putin hava skrivað undir tveir týðandi sáttmálar seinastu dagarnar. Fyrst staðfestu teir sáttmálan um at skerja kjarnorkuvápnini og síðani sáttmálan um tað nýggja NATO-Russland ráðið.

**Tann nýggi samstarvssáttmálin millum NATO og Russland varð undirskrivaður í Rom í gjár.**

NATO/RUSSLAND
*Árni Joensen:*

NATO og Russland skrivaðu í gjár undir tann søguliga sáttmálan, sum gevur Russlandi sæti í einum nýggjum felags NATO-Russland ráði. Russland fær limaskap á jøvnum føti við NATO-londini, men russiska umboðið fær ikki sýtingarrætt.

Sambært viðtøkunum hevur Russland nú ávirkan á ein part av viðgerðunum og avgerðunum hjá NATO. Talan er m. a. um mál, ið hava samband við altjóða yvirgang og um tiltøk til tess at forða fyri, at fleiri lond fáa fatur á hópoyðingarvápnum.

Aðalskrivarin í NATO, George Robertson, segði aftan á staðfestingina í Rom í gjár, at tilburðurin var søguligur. Hann vísti á, at í framtíðini skulu NATO og Russland samstarva sum javnbjóðis samstarvsfelagar. Tí er eisini talan um ein søguligan sáttmála, segði aðalskrivarin.

Politisku leiðararnir í øllum teimum 19 NATO-londunum við amerikanska forsetanum, George W. Bush, á odda vóru hjástaddir undir hátíðarhaldinum saman við russiska forsetanum, Vladimir Putin.

Mánakvøldið segði Putin við russiskt sjónvarp, at tann nýggi sáttmálin við NATO fer at geva Russlandi stórar fyrimunir og fer at knýta landið nærri altjóða samfelagnum.

Í sambandi við tað nýggja samstarvið lat NATO eina kunningarstovu upp í Moskva í gjár. Kunningarstovan skal kunna russar um arbeiðið í NATO og um felags samstarvið millum verjusamgonguna og Russland. Herumframt skal røkja tann partin av nýggja sáttmálanum, sum heimilar russiskum heryvirmonnum at fáa venjing í NATO-londunum.

# Hungursvanlukka hóttir átta milliónir fólk

**Hóast fleiri ávaringar um vandan fyri hungursneyð í syðra parti av Afrika gongst illa at fáa tey ríku londini at veita neyðuga hjálp.**

HUNGURSNEYÐ
*Árni Joensen:*

Altjóða matvøruverkætlanin WFP endurtekur nú, at verður einki gjørt, fara átta milliónir fólk í fleiri londum har suðuri í Afrika at líða hungur.

-Sum er liva 2,6 milliónir fólk í Malawi, Zambia, Zimbabwe, Mosambik, Lesotho og Swazilandi av tí, sum vit eru før fyri at geva teimum, men um einar 40 til 60 dagar verður neyðugt at veita meiri enn fimm milliónum fólkum afturat hjálp. sigur WFP.

Talsmaðurin hjá WFP, Richard Evans, sigur, at stovnurin hevur biðið um 550 milliónir krónur til at útvega neyðugar matvørur fyri, men higartil hava tey bara fingið 25 milliónir krónur.

-Tað er trupult at síggja, hvussu vit skulu útvega ta neyðugu hjálpina. Verður ikki skjótt atborið, fáa vit eina ógvusliga vanlukku, tí støðan er so ring, sum hon ikki hevur verið síðani ta stóru hungursvanlukkuna fyri tíggju árum síðani, sigur Richard Evans.

Ringast stendur til í Malawi, har umleið 70 prosent av fólkinum hava ov lítið til matna.

Orsøkin til ta ringu støðuna í Malawi er ikki einans turkurin, sum hevur gjørt um seg í ár. Í fjør varð landið rakt av vatnflóð, sum oyðilegði ein stóran part av landbúnaðarjørðini. Kirkjuligir felagsskapir, sum arbeiða í Malawi, siga, at umleið 10.000 fólk eru longu deyð har, og at umleið hundrað fólk doyggja í hungri um dagin.

Úr Norðurlondum:

## Bíða eftir dóminum

Valfelagið hjá Vinstra í donsku kommununi Farum vil ikki koyra fyrrverandi borgarstjóran Peter Brixtofte úr felagnum. Herfyri samtykti fólkatingsbólkurin hjá flokkinum at koyra Brixtofte úr bólkinum, og tá segði formaðurin, Anders Fogh Rasmussen, at samtyktin var ein óbeinleiðis áheitan á valfelagið í Farum um at gera tað sama.

Men tað ger valfelagið ikki. Á einum fundi mánakvøldið samtykti ein stórur meiriluti at lata Peter Brixtofte halda fram í felagnum. Grundgevingin var, at fyrrverandi borgarstjórin er ikki sekur, fyrr enn hann er dømdur, og at valfelagið tí fer at bíða eftir dóminum.

## Ap fram - Høgri aftur

Ein veljarakanning í Noregi vísir, at Arbeiðaraflokkurin hevði fingið framgongd, hevði val verið nú. Eftir kanningini hevði fyrrverandi stjórnarflokkurin fingið 22 prosent, sum er hálvt annað prosent meiri enn íseinastu kanning, sum varð gjørd fyri einum mánað síðani.

Høgri, sum situr í stjórnini hjá Kjell Magne Bondevik, hevur afturgongd. Nýggja kanningin gevur flokkinum 20,4 prosent, sum er 3,8 prosent minni enn íkanningini í apríl. Framburðsflokkurin er størsti flokkur í Noregi við 22,3 prosentum. Tað er eitt prosent minni, enn hann fekk í seinastu kanning.

## Svølgdi kokainið

Tollararnir í Oslo-floghavnini Gardermoen gjørdu kvetti nú um dagarnar. Teir fingu illgruna til ein brasilskan ferðamann, tí teir hildu atburð hansara vera í so løgnan. Tað vísti seg, at brasiliumaðurin hevði svølgt 51 pakkar við kokaini. Tá pakkarnir vórðu lagdir á vektina, vísti hon eitt hálvt kilo. Brasiliumaðurin sigur seg ikki vita, hvør skuldi hava kokainið. Sjálvur skuldi hann fáa 2800 dollarar fyri ómakin.


# ítróttur

Nr. 99 • mikudagur • 29. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


Kvinnur: KÍ – B36 2-0 (1-0)

# Sigursrøðin heldur fram

**KÍ fekk sín triðja sigur í ár, tá kvinnurnar úr Klaksvík vunnu 2-0 á nærmasta kappingarneytanum, B36. Sigurin var uppiborin, og KÍ er longu eina bátslongd frammanfyri hini liðini**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*KÍ vann sunnudagin 2-0 á B36. Kvinnurnar úr Klaksvík hava fult stigatal eftir tríggjar dystir, og tær verða tungar at syfta í ár*

*Mynd: SáH*

Tað eydnaðist at KÍ at vinna sín triðja landskappingardyst á rað, tá B36 var á vitjan. KÍ hevur í hesum trimum fyrstu dystunum skotið tjúgu mál, og bara eitt er farið inn. KÍ er tí stórfavorittur til at vinna FM-heitið í ár.

Tað einasta liðið, sum møguliga kann hótta KÍ, er B36, munnu tey flestu halda. Hóast sigurin ikki var av teimum størstu, lat KÍ ongan iva vera um, hvat betra liðið var, og sigurin mundi vera uppiborin.

KÍ skapti teir bestu málmøguleikarnar og legði seg framum seint í fyrra hálvleiki. Bára Skaale sendi eitt hornaspark innfyri, har Malena Josephsen stóð púra leys tætt undir málinum. Hon setti høvdið á bóltin til 1-0.

B36 royndi at svara aftur og setti eisini nøkur álop í gongd, men tann seinasta og avgerandi sendingin vantaði altíð.

### Rannvá økir

KÍ helt fram við framsøknum álopsspæli eftir steðgin, og tað gav úrslit tíðliga í seinna hálvleiki. Rannvá Andreasen sendi innfyri, men bólturin fór ístaðin í netið. Ivasamt var, um Rannvá ætlaði at skjóta uppá mál ella senda innfyri. 2-0 til KÍ, og nú var torført hjá B36 at venda dystinum.

Útiliðið fekk eisini ein dyggan smeit stutt eftir málið, tá Elsebeth Jónsson fekk ein álvarsaman skaða og mátti av vøllinum. Hon hevur eftir øllum at døma brotið eitt bein í fótinum og verður neyvan at síggja á vøllinum komandi vikurnar.

KÍ hevði sum heild tamarhald á dystinum, men fleiri mál komu ikki.

### Eingin dómari

Dómarin, sum var settur til kvinnudystin sunnudagin, møtti ikki upp. Hann hevði eftir øllum at døma annað at takast við, so kvinnurnar stóðu á vøllinum uttan dómara.

Til alla lukku var dómarin, sum hevði dømt ein dyst frammanundan, fúsur at taka hesa ábyrgdina, so dysturin kundi spælast.

Leikarar og venjarar eru sum vera man sera ónøgd við, at slíkt yvirhøvur kann fara fram í fremstu kvinnudeildini í Føroyum, og hetta endurtekur seg vónandi ikki.

# Gunnar Dahl Olsen var sigursharri

**Gunnar Dahl Olsen vann ta fyrstu triathlon-kappingina, sum var sunnudagin. Hann vann við einum hálvum minutti frammanfyri Boga Lenvig, og Eli Christansen var á triðja plássi**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin kappaðust triathloníðkararnir fyri fyrstu ferð í ár, hesaferð á 1/8 triathlon, ið er 750 m svimjing, 20 km súkkling og 5 km renning.

Saman við duathlonkappingunum, var hetta triðja Grand Prix kappingin hjá Føroya Triathlon Felag í ár.

Nýggju íðkarar møttu, men hóast hesa undirtøku var liðið eitt sindur skert, tí nakrir íðkarar rógva eisini, og teir vóru á stevnu á Skála.

Roknað var við, at Bogi Lenvig fór at vera fyrstur upp úr hylinum og so var. Í hølunum á honum komu Eli Christian og Katrin Sørensen, meðan Gunnar Dahl-Olsen lá 2 minuttir aftanfyri Boga. Bogi og Eli vóru fyrstir út á súkklurutuna, men sum nakað nýtt, so skifti Gunnar eisini skjótt og var ikki langt aftanfyri. Gunnar og Eli komu fram um Boga í súkklingini, men heldur ikki her var munurin stórur. Í renningini var Bogi aftur stívastur, og fekk hann Eli aftur, men Gunnar rann so mikið væl, at hann kom fyrstur um málstrikuna.

Hjá hinum gekst tað soleiðis, at Evald og Beinir komu mestsum í senn upp úr hylinum og vóru skjótir út á súkkluna. Nevnast kann, at Evald brúkti 1 min 19 sek um at koma upp úr hylinum, lata seg í og renna til súkkluna. Men hann megnaði bara at súkkla 3 km, so yvirhálaði Beinir hann. Beinir skifti og súkklaði upp á bestu við tíðini, sum var 32 min 07 sek.

Tveir minuttir aftanfyri teir kom Kári Simonsen upp úr hylinum, og háladi hann nógv inn á Evald í súkklingini, og hevði Kári runnið sum hann rann flaggdagin, so hevði hann sloppið framum. Eyðtór og Robert vóru við fyri fyrstu ferð í ár. Báðir hava teir drigist við ilsku í vetur, Eyðtór í rygginum og Robert við áhaldandi krími. Teir hava ikki vant svimjing í vetur, og kom hetta teimum aftur um brekku, men tá komið var út á súkklu- og rennirutuna gekst betri. Eyðtór hevur vant súkkling síðstu tíðina, og átti hann tí munin, tá teir báðir komu á mál.

Katrin, sum var einasta kvinnan hendan dagin, vísti at hon stendur seg væl, sjálvt um hon ikki hevur servant súkkling og renning, men hetta sær út til at liggja væl fyri hóast alt. Hon stóð seg so mikið væl, at tíðin hjá henni er besta tíð hjá kvinnum á 1/8 teininum.

Tað er soleiðis í triathlon, at tá skift verður millum ítróttagreinirnar, mugu íðkararnir eisini skifta í klæðir, sum hóska til ítóttagreinina. Hetta skiftið verður ofta rópt »gloymda ítróttagreinin«, tí íðkararnir geva skiftunum ov lítlan ans, og missa nógva tíð óneyðugt. Ofta er munurin fleiri minuttir.

Hesi skift síggjast ikki í talvuni niðanfyri, tí ikki var nóg nógv av hjálparfólki, og er klædnaskiftið tí roknað upp í súkklingina og renningina.

Ein av íðkarunum tók millumtíðirnar sjálvur, og hjá honum sá soleiðis út:

| Navn | Svimjing | Skift 1 | Súkkling | Skift 2 | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 12:14 | 1:19 | 35:40 | 0:29 | 32:03 | 1:13:15 |

**Úrslitið hjá monnunum :**

| Navn | Svimjing | Súkkling | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|
| Gunnar D Olsen | 11:24 | 32:48 | 20:07 | 1:03:19 |
| Bogi Lenvig | 09:34 | 36:29 | 17:45 | 1:03:48 |
| Eli Christiansen | 10:42 | 35:37 | 20:58 | 1:06:17 |
| Beinir Rasmussen | 12:26 | 32:07 | 22:42 | 1:09:15 |
| Evald Rasmussen | 12:14 | 36:59 | 23:32 | 1:13:15 |
| Kári Simonsen | 14:19 | 37:12 | 23:33 | 1:15:04 |
| Eyðtór Joensen | 17:45 | 41:38 | 24:14 | 1:23:54 |
| Robert Vilhelmsen | 18:54 | 43:51 | 24:18 | 1:27:03 |

**Úrslitið hjá kvinnuni:**

| Navn | Svimjing | Súkkling | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|
| Katrin Sørensen | 10:51 | 41:57 | 24:25 | 1:17:13 |

Samlaða støðan aftan á 3 umfør:

| Menn | Stig |
|---|---|
| 1. Eli Christiansen | 94 |
| 2. Gunnar Dahl-Olsen | 93 |
| 3. Hallur Stakksund | 74 |
| 4. Bogi Lenvig | 74 |
| 5. Evald Rasmussen | 43 |
| 6. Kári Simonsen | 38 |
| 7. Dia Jacobsen | 30 |
| 8. Beinir Rasmussen | 26 |
| 9. Eyðtór Joensen | 18 |
| 10. Robert Vilhelmsen | 16 |

| Kvinnur | Stig |
|---|---|
| 1. Katrin Sørensen | 80 |
| 2. Rannvá Jacobsen | 74 |
| 3. Annika Jacobsen | 30 |
| 4. Brynhild Klein | 26 |